# Upp á gólv á Vaglinum

**Í ár eru 30 ár liðin, síðani fyrstu ferð varð sungið á Vaglinum á ólavsøku, og seinnu árini er eisini vorðin fastur táttur at kvøða Ormin Langa, tá midnáttarsangurin er av**

ÓLAVSØKA
*Orð og myndir*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*



*Tað eru 30 ár í ár, síðani fyrstu ferð var sungið á Vaglinum. Tað gjørdist eisini siður at sláa ring og dansa føroyskan dans. Tó gingu nógv ár, áðrenn hetta varð skipað. Fólk dansaðu hvør í sínum lagi, sum best bar til og kvøddu ymisk kvæði. Tí varð heitt á dansifelagið, Sláið Ring, um at finna ein fastan skipara, so dansurin kundi ganga betur. F.v.: Heini Holm, Tóri í Hoyvík, Herluf Joensen, Petur Olivar í Hoyvík og Regin Eikhólm*

Um tíggju ella tólvtúsund fólk vóru savnaði á Vaglinum á midnátt ólavsøkukvøld. Longu um ellivutíðina, tá Frelsunarherurin hevði útimøti var stúgvandi fult av fólki og lýddi á teirra vakra song og vitnisburð.

So hvørt klokkuni nærkaðist midnátt vaks mannamúgvan. Áarvegurin, Vaglið, Tinghúsvøllurin, Tinghúsvegurin og Niels Finsensgøta, allastaðni var stúgvandi fult, og út í hvønn krók stóðu fólk. Ongantíð áður hevur undirtøkan verið so góð sum í ár.

Her vóru fólk av øllum slag savnaði - fólk við ymiskum lívsákoðanum og lívslagnum - øll sungu sama lag og somu orð. Kenslan av felagsskapi er intens eina slíka løtu. Tað kendist, sum hoyrdu vit øll saman, og tað vóru helst fleiri enn eg, (blaðkv.) sum kendu eina gleði um at verða fødd í Føroyum og at hoyra til her.

Tað sjáldsama við hesi løtu er, at alt gongur so friðarliga fyri seg, eingi róp ella geipan, og eingin er, sum ger ónáðir.

– Tað var av tilvild, at hetta tiltakið byrjaði, sigur Ólavur Hátún, sum øll árini hevur leitt sangin.

Nakrir av sangarunum í Havnakórinum hittust tilvildarliga í býnum og tóku á at syngja. Fólk, sum vóru í býnum, vóru skjót at taka undir við sanginum, og soleiðis byrjaði hetta vælumtókta tiltak fyri 30 árum síðani.

## Krevur sín mann

Tað varð eisini vanligt tá, at fólk eftir sangin slóu saman ring og dansaðu føroyskan dans. Tó gingu nógv ár, áðrenn hetta varð skipað, sum tað er í dag. Fólk dansaðu hvør í sínum lagi, sum best bar til og kvøddu ymisk kvæði.

Ólavur Hátún greiðir frá, at hann heitti á landsdansifelagið, Sláið Ring, um at finna ein fastan skipara, so dansurin kundi ganga betur.

– Hetta hildu vit vera eitt gott hugkot, og vit gjørdu av at biðja Petur Olivar í Hoyvík taka sær av at skipa føroyska dansin á ólavsøku, sigur Regin Eikhólm, sum tá var formaður í Sláið Ring.

– Til at skipa føroyskan dans í so stórari mannamúgvu krevst ein hollur og støðufastur skipari, og tað mettu vit Petur Olivar at vera. Hann hevur góða og fasta rødd og fer ikki av lagi, um onkur í kenningini hevur hug at órógva hann, sigur Regin.

Á heimasíðuni hjá Sláið Ring skrivar Eyðun Andreasen, fólkalívsfrøðingur soleiðis:

"Skiparin er høvuðspersónurin í frásøgnini ella rættari framførsluni. Hann byrjar kvæðið ella vísuna, og hann byrjar øll ørindini. Hann setur sín serliga dám á dansin. Hann ger av tempo, hvussu høgt verður kvøðið, um kvøðið verður stillisliga ella harðligari, hann setur sín dramatiska dám á dansin við at brúka allar teir møguleikar, dansurin goymir í sær.

Atburður og háttalág við ørmum og kroppi og andlitsbrá hansara hava nógv at siga, fyri at skiparin kann fáa tað rætta sambandið við dansifólkið, so hann fær kvæðið undir fót, frásøgan eydnast og dansurin gongur væl".

Tað var í 1996, at Petur Olivar fyrstu ferð skipaði á ólavsøku, og hevur hann skipað Ormin Langa hvørja ólavsøku síðani tá.

Teir, sum skipa fyri sangi og dansi á Vaglinum, eru sera vælnøgdir við tiltakið í ár. Sum nakað nýtt var til sangin spælt undir upp á harmoniku, og riggaði tað serstakliga væl og lyfti sangin, so fólk sungu væl við.

Tað var nakað nógv ferð á dansinum í byrjanini, men tað fekk skiparin bilbugt við, so hvørt dansurin leið. Hetta komst helst av, at sangløtan endaði við einum løttum kvæði, men møguliga eisini tí, at fólk duga Ormin Langa, eitt nú frá útgávuni hjá Týr, siga tey, ið hava skil fyri føroyskum dansi.



*Síðani 1996 hevur Petur Olivar í Hoyvík skipað dansin á ólavsøku.*

*– Til at skipa føroyskan dans í so stórari mannamúgvu krevst ein hollur og støðufastur skipari, og tað mettu vit Petur Olivar at vera. Hann hevur góða og fasta rødd, og fer ikki av lagi, um onkur í kenningini hevur hug at órógva hann, sigur Regin Eikhólm, sum tá var formaður í Sláið Ring*

### Føroyski dansurin

Fyrr í tíðini var vanligt, at kvøðið varð heima við hús um kvøldarnar, tá fólk sótu í roykstovuni, hvør við sínum arbeiði. Hetta var brúkt sum undirhald og fyri at lætta um arbeiðið.

Í gamlari tíð varð dansað í roykstovunum og seinni vórðu dansistovur bygdar.

Men í eini andaligari veking fyrst í seinastu øld, fekk føroyski dansurin eitt rættiligt slag fyri bógvin. Tey, sum tá komu til umvending, tóku seg burtur úr dansinum, tí tey hildu tað ikki vera rætt at dansa. Fleiri av hesum vóru av bestu kvøðarum, og í fleiri bygdum stóðu dansistovurnar nú tómar. Tað var soleiðis í fleiri bygdum, at saman við dansinum var nógv drekkarí og ólevnaður, og hetta liðu serliga kvinnurnar og børnini undir.

Men eisini var føroyski dansurin í harðari kapping við enska dansin, sum tiltalaði tey ungu meira enn tungi føroyski dansurin.

Tá vóru fólk, sum sóu, at varð ikki okkurt munagott gjørt fyri at føroyski dansurin ikki skuldi doyggja út, so varð honum neyvan lív lagað. Dansifeløg vórðu sett á stovn, og í nýggjari tíð er arbeitt fyri at fáa frálæru í føroyskum dansi í skúlanum.

Í dag er vanligt, at farið verður upp á gólv í skúlunum, og munnu tað vera fá børn, sum ikki taka lut í hesum aldargamla og fyri Føroyar serstaka siði.

"Tað er ikki greitt, nær og hvussu ringdansurin kom til Føroya, men kvæðadansurin, ið nú verður kallaður føroyskur dansur, er serstakur fyri land okkara. Um hetta er upprunaligur dansur í Føroyum, ella hann er komin higar aðrastaðni, er ikki heilt lætt at siga. Helst tað seinna, men so er spurningurin, hvussu og hvønn veg hann er komin. Dansur og kvøðing eru nevnd í einstøkum frásagnum um veitslur so tíðliga sum fyrst í 1600-talinum, men hvussu hann tá hevur verið troðin, vita vit heldur ikki heilt". Hetta stendur at lesa um dansisøguna á heimasíðuni hjá Sláið Ring, www.slaid-ring.fo. Tað Eyðun Andreasen, sum professari í skaldskapi av manna munni, ið hevur skrivað.



# Ivasom løgmansrøða í Grasagarði

**- Skulu pedofilar eisini viðurkenna sín seksuella samleika? Er humanisman í ferð við at máa støðið undan føstu, tryggu virðunum? Hetta spyr Símun Absalonsen eftir røðuna í Grasagarði hjá Jóannesi Eidesgaard á tiltakinum hjá Friðarboganum**



**Símun Absalonsen**
*Viðmerking*

Í Danmark er politiska skipanin seinastu tíðina tvær ferðir vorðin útpurrað í samband við mál, ið viðvíkja fólkaskúlanum og fólkakirkjuni. Skúlamálið viðvíkur sonevnda Samuelskolen, ið sigst ikki at geva frálæru eftir almennu undirvísingarkunngerðini. Skúlin hevur dittað sær vísundaliga at seta spurnartekin við, um menniskjað er ættað frá apum, sum aftur eru ættaðar frá skriðdjórum, sum aftur eru ættað frá fiskum, sum aftur eru ættaðir frá amøbum, sum aftur eru ættað úr gróti, sum er komið úr ongum.

Skúlin ivast í, um niðanfyri standandi matematiska líkning hevur vísundaligt grundalag: Stjørnustøv + tíð = omma + abbi.

Embætismannavaldið í Danmark heldur fast við, at ikki eigur at verða sett spurnartekin við "náttúruvísundaliga" familjualbumið, og um skúlin ikki heldur fast við almennu trúarjáttanina á omanfyri nevndu líkning, so verður eingin statsstuðul latin skúlanum.

Trúgv á menniskjuna sum eina biologiska yvirlivilsismaskinu, vorðin til av kosmiskari tilvild, er í navninum á sonevndari rationalismu og fólkaupplýsing vorðin eitt "religiøst" faktum. Her er ikki pláss fyri sakligum vísundaligum atfinningum, og enn minni nøkrum metafysiskum "møsni" um ein møguligan skapara.

At tað ikki bert eru "fundamentalistiskir býttlingar" ið ikki góðtaka omanfyri nevndu líkning, men eisini ørgrynna av professarum innan náttúruvísund, harav fleiri nobelvinnarar, er neyvan paratvitan innan skúlagátt. Slík vitan er neyvan lætt atkomilig í einum sensureraðum skúla, ið skal eitast at vera rúmskygdur.

Vit mugu bert staðfesta at staturin ræður sjálvur fyri, hvat hann stuðlar, men enn hava vit tíbetur rætt at hugsa.

## Grosbøll málið

Hitt málið ið hevur stolið forsíðurnar í donsku bløðunum er "Grossbøll" málið. Ein prestur í fólkakirkjuni, ið sum kunnugt er partvíst statsstuðlað, sigur seg ikki trúgva á skaparan. Ivasamt er nú um hann varðveitir embætið og sín "stuðul" frá statinum.

At staturin setur sum krav, at ein prestur í fólkakirkjuni hevur trúgv á skaparan er væl skiljandi. Men løgið má tað kennast, at meðan skapanartrúgv er treytin fyri at staturin kann stuðla fólkakirkjuni, so er skapanarvantrúgv treyt fyri um sami statur skal stuðla fólkaskúlanum.

Hvat mundu Kierkegaard og Grundtvig sagt í dag um sítt kæra skisofrena móðurland.

## Svensk toleransa

Í Svøríki hava tveir dómsúrskurðir í ár fingið nógva umtalu í pressuni. Ein fríkirkjuprestur er dømdur 30 dagar aftanfyri rimarnar, av tí at hann í eini prædiku hevði tikið undir við bíbilska sjónarmiðnum um homofili. Hann varð meldaður eftir sonevndu antidiskriminatiónsparagraffini. Dómstólurin mátti tískil viga hesa paragraff uppímóti lógini um trúar- og talufrælsi, men hesar seinnu vórðu funnar ov lættar at vera og presturin noyðist tí aftur um rimarnar í tí "toleranta" Svøríki.

Enn er bíblian kortini ikki tikin av hyllini í svenskum bókhandlum.

Hin dómurin viðvíkur drápinum av kenda svenska politikaranum Anne Lind. Hon varð mett av mongum sum komandi socialdemokratiskur forsætisráðharri. Drápsmaður hennara varð dømdur í sálarliga viðgerð, og verður helst eftir hesa viðgerð ein fríur maður. Einkjumaðurin eftir Onnu Lind er í øðini og nógvir sviar eru ørkymlaðir. Teir krevja lógina broytta og halda, at drápsmaðurin slapp alt ov lætt.

Socialdemokratiski flokkurin í Svøríki hevur verið ein framherji í heiminum tá talan er um at innføra humanistiska lóggávu. Humanisma er ein filosofisk fólkareligión, sum er ateistisk, tvs. trýr ikki á nakran Gud. Humanisman hevur tikið nakað av sínum "bleytu virðum" úr kristindóminum, og roynir at misnýta kristindómin fyri at marknaðarføra síni sjónarmið, men humanisman avnoktar avgjørt játtanargrundarlagið í kristnu trúnni. Hetta kann lesast í humanistiska manifestinum frá 1973.

Tá eingi absolutt virði finnast í tilveruni, er spurningurin um rætt ella skeivt altíð relativur. Etikkur og moralur er avgjørdur útfrá tíðarráki. Tað sum etiskt rætt í dag er kanska skeivt í morgin og øvugt. Eitt samfelag ið byggir á humanismu gerst ein tongul í brimi.

At svenskir socialdemokratar eru ørkymlaðir eftir dómin í Onnu Lindt málinum er kanska skiljandi. Men teir hava í stóran mun mynda svenskt lóggávuvald í ein mansaldur, og spurningurin er tí, um "fríkenningin" av drápsmanninum ikki beinleiðis er eitt úrslit av tí humanistiska evangelii, teir sjálvir í stóran mun hava verið við til at innført í Svøríki.

Menniskjalig gen avgera nú ikki bert húðalit. Men summir humanistar prædika at øll atferð er annahvørt miljø- ella genbestemt, tað veri seg seksuell orientering, religiøsitetur, kriminaliteur, osfr. Og tá vit ikki sjávi avgeran miljø ella gen, kunnu vit so ábyrgjast fyri tí, ið vit gera?

## Føroyar við eitt vegamót?

Men tað er ikki bert í Svøríki og Danmark at borgarar kunnu fáa ikki sørt ambivalentar kenslur mótvegis politiska valdinum. Føroyar eru einki undantak. Politikarar okkara vera stundum bodnir við til ymisk tiltøk og alt gott um tað. Kl. 19 ólavsøkuaftan vóru tvey umboð fyri landsstýrið við til tvey ymisk tiltøk. Løgmaður røddi í Grasagarði, har felagið Friðarbogin (felag teirra samkyntu) skipaði fyri, og samstundis var mentamálaráðharrin í Margarinfabrikkini har hann helt røðu í samband við, at framsýningin um kristna mentunararv føroyinga lat upp.

Í røðu løgmans vóru lyklaorðini "hóvsemi, andsfrælsi og tolsemi". Hetta ljóðar sera gott, men spurningurin er, um hesi hugtøk kunnu standa einsamøll, uttan at finna akkersgrund í føstum virðum. Tey føstu virðini eru ikki til at fáa eyga á í humanistisku røðu løgmans og tað reisir beinan vegin nakrar spurningar.

Tá løgmaður tosar um tolsemi, er tað tá tað svenska "tolsemi" vit kunnu vænta okkum? Tá løgmaður í røðuni sigur, at tað er skilagott at viðurkenna sín egna kynsliga samleika, umfatar hetta so eisini tey pedofilu? Soleiðis kundu vit hildið á at spurt. Røðan hevði onga hellugrund, og reisir fleiri spurningar heldur at svara nøkrum.

Øðrvísi var í margarinfabrikkini. Her røddi mentamálaráðharrin um tey føstu kristnu virði, ið hava bygd tjóð okkara, men sum í dag tykjast at standa við eitt vegamót. Hann nevndi eisini humanismuna, sum ikki viðurkennir sær nakrar fastar normar, ella nakran mynduleika yvir sær.

-Í humanismuni er tað menniskjað sjálvt, ið skapir sær sínar egnu normar, einki pláss er fyri nøkrum givnum lívsreglum og eingir normar eru, sum ikki kunnu broytast, segði mentamálaráðharrin.

Hann endurgav fleiri dømi úr føroyskum skaldskapi sum staðfesti, at kristni siðaarvur og mentan ikki vóru flótandi hugtøk, men absolutt virði. Tað vóru slík virði, ið eyðkendi førningin hjá monnum sum Símun av Skarði, Mikkjal á Ryggi, Rasmus á Háskúlanum, oø.

Nú ólavsøkan er farin afturum er at vóna, at hóvsemi, andsfrælsi og tolsemi, grundað á trygg og føst virði, í framtíðini skulu eyðkenna tjóð okkara.

Millum mongu føroysku skaldsligu perlurnar ið mentamálaráðharrin endurgav ólavsøkuaftan var eisini hendan eftir Jóannes bónda:

*-Um nú nýggjar øldir líða,*
*halt á somu leið várt starv, at*
*vit ikki lata svíða, dugnaloysi*
*til hin arv,*
*sum vit ervdu fedrum av;*
*tá skal lyftið, sum tú gav,*
*allan aldur Føroyum tryggja,*
*føroyingunum her at byggja.*

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 32, 2004
www.kaupthing.fo

# Lánsbrævarentur lækkaðu

Í farnu viku lækkaðu lánsbrævarenturnar orsakað av búskaparvakstrartølunum úr USA, ið vóru kunngjørd. Hóast vøksturin fyri fyrsta ársfjórðing varð dagførdur úr 3,9% í 4,5% so gjørdist vøksturin fyri annan ársfjórðing 3,0%; væntað varð 3,7%. Hóast vakstrartølini ikki vóru eins vánalig, og líkt var til, so lækkaðu lánsbrævarenturnar kortini.

Ein onnur orsøk til lækkaðu lánsbrævarenturnar, vóru ávaringar frá innanlendis trygdarráðnum í USA, um yvirgang. Eisini oljuprísurin, ið er javnt og samt hækkaður allan juli mánaða, hevur trýst renturnar niður. Oljuprísurin er í høvuðsheitum hækkaður av búskaparligu framgongdini í heiminum; samstundis kann ein ov høgur oljuprísur tálma hesai framgongd. Tá 10 ára rentan var á lægsta stigi í ár var hon 4,01%, hægsta stigið var 4,59%.

Høvuðshendingin hesa vikuna verður fríggjadagin, tá mánaðarliga amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin verður kunngjørd. Seinast gjørdist hendan eitt vónbrot tá einans 112.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn. Hesuferð verður roknað við, at 247.000 arbeiðspláss verða sett á stovn. Sannlíkindi er tó fyri einum hampuligum tali, ið kann fáa renturnar at hækka.

Eisini vinnuálitið úr USA (ISM), fer at ávirka vikuna. ISM verður kunngjørt mánadagin. ISM hækkar væntandi eitt vet, men samstundis verður eisini prísvakstrar-ISM kunngjørt. Tí verður trupult at siga, hvussu ISM sum heild fer at ávirka. Av tí at fleiri veik lyklatøl eru kunngjørd í seinastuni metur Kaupthing, at høvuðstalið, ið bendur á virksemið í USA, fer at ávirka mest.

Hesa vikuna kunngerða m.a. virkini Tele2, TDC, NovoZymes og Sandvik roknskap. Hetta eru tíðandi virkir á norðurlendsku marknaðunum, men megna ikki at ávirka parbrævamarknaðirnar sum heild.

Sum heild kann ein óstøðug vika væntast, har ISM fær fyrsta orðið. Hereftir fara marknaðirnir at bíða eftir arbeiðismarknaðarfrágreiðingini. Hendan fer at fáa ávirkan á hvussu renturnar fara at hátta sær næsta mánaðin. Annars hevur ECB rentufund hesa vikuna, men hesin er ikki serliga áhugaverdur.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,63% | -0,07% |
| 5 ára lánsbræv | 3,71% | -0,08% |
| 10 ára lánsbræv | 4,35% | -0,06% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 265,3 | 1,1% |
| OMX, Svøríki | 680,4 | 2,8% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.697,7 | 2,2% |
| S&P 500, USA | 1.101,7 | 1,6% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,18 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 165,98 | -0,2% |
| Norrøn Partabrøv | 77,41 | 2,0% |
| Altjóða Vøkstur | 59,49 | 0,9% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 615,99 | 0,6% |
| EUR | 743,59 | 0,0% |
| GBP | 1.127,01 | 0,0% |
| NOK | 88,31 | 0,8% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru ítroknaðar í mun til fyri viku síðan.*